# Landsstýrið ætlar nú at taka meiri pengar frá fólki

**– Samstundis sum Landsstýrið lovar at seta skattin niður, er ætlanin er at seta eina dulda skattahækking í verk, og tað góðtaka fakfeløgini ikki, sigur Ingeborg Vinther**

SKATTUR
*Áki Bertholdsen*


*Landsstýrið ætlar at leggja hald á tað, sum fólk spara við at gjaldið til ALS lækkar, men tað góðtaka fakfeløgini ikki, sigur Ingeborg Vinther*

– Nú fólk fáa ein møguleika at spara eitt lítið sindur av pengum, má landsstýrið ikki sleppa at leggja hald á teir.

Politikkurin hjá Landsstýrinum hevur enn einaferð fingið fakfeløgini at ressast við.

Tað er spurningurin um inngjaldið til Arbeiðsloysisskipanina, sum nú fáa fakfeløgini at reisast ímóti Landsstýrinum.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at nú ætlanin er at lækka inngjaldið til ALS, ætlar Landsstýrið at leggja hald á peningin og tað góðtaka fakfeløgini ikki.

Hon sigur, at seinni verður stórur fundur ímillum øll fakfeløgini, har tey fara at viðgera málið og sat taka støðu til, hvat skal gerast.

Beinleiðis orsøkin til, at fakfeløgini nú ætla at mótmæla politikkinum hjá Landsstýrinum, er, at nú er ætlanin at lækka inngjaldið til Als.

– Í tí sambandi eru tað politikarar í Landsstýrinum, sum rógva framundir, at peningurin, sum fólk spara av teirri orsøk, skal gjaldast í Barnsburðargrunnin so at tað verður ráð til at longja farloyvið upp í 52 vikur. Tað hevur eisini verið nevnt, at tað skal brúkast til at fíggja karendsdagar við.

– Hetta kann ikki koma upp á tal, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at tað er fólkið sjálvt, sum eigur peningin og tað, sum fólk nú spara við at gjaldið til Als lækkar, skal koma teimum sjálvum til góðar og tað kann ikki koma uppá tal at tað skal enda í landskassanum til barnsburðarfarloyvi ella nakað annað, sigur Ingeborg Vinter.

Tí eru øll fakfeløg kalla saman til fundar seinni at viðgera støðuna og at gera av, hvat skal gerast við málið, men hetta kann ikki góðtakast, sigur Ingeborg Vinther.

### Eru lumpað einaferð

Hon sigur, at í løtuni er gjaldið til Als 1,25 % av lønini, men tað lækkar nú niður í 0, 5%, sum er tað lægsta, tað hevur verið.

Tá ið gjaldið varð hægst, var tað 2,75%.

– Tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir, sum burturav eiga ALS og betala alt, sum fer í skipanina og tí er tað fólkið, sum eigur peningin, sum er í skipanini. Politikararnir hava ongantíð viljað havt nakað við ALS at gera og teir skulu ikki sleppa at leggja hald á peningin, nú tað eru góðar tíðir og nakað ALS-skipanin er væl fyri.

– Teir vildu ikk vitað av Als, tá ið ringar tíðir vóru í Føroyum. Tá vóru tað partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum hingu upp á skipanina og politikararnir skulu ikki leggja hald á peningin, hjá fólki, nú, tað gongur væl.

– Umboðini fyri fakfeløgini hava alla tíðina roynt at fingið arbeiðsloysisstuðulin upp á 80% av eini arbeiðarainntøku, men tað er ongantíð eydnast.

– Tað einasta, vit hava kunnað samst um, er at lækka inngjaldið og nú tað lækkar niður í 0,5 % av lønini, skal Landsstýrið ikki sleppa at leggja hald á peningin, tí tað skal koma teimum til góðar, sum eiga peningin, sigur hon.

Hon sigur, at Stýrið fyri ALS hevur øll árini hækkað og lækkað gjaldið eftir, hvussu tíðirnar eru, men tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum hava goldið hækkingarnar og tí skulu partarnir á arbeiðsmarknaðinum eisini hava ágóðan av lækkingini og at politikararnir halda seg burtur.

Ingeborg Vinther sigur, at fakfeløgini eru lumpað einaferð, tí einaferð ALS gjaldið lækkaði, var peningurin tikin til barnsburðargrunn og tað skal ikki henda aftur.

### Duld skattahækking

Hon vísir á, at landsstýrið hevur lovað at lækka skattin.

Men verður hald lagt á tað, sum fólk spara við at inngjaldið verður lækkað, er talan um eina dulda skattahækking.

– Hóast tíðirnar eru góðar nú, er tað nógv, sum bendir á, at gongdin er við at venda.

– Tað skal ikki ein serliga djúp kreppa til, so verður neyðugt at hækka gjaldið aftur, og so er talan í veruleikanum um eina skattahækking, tí so koma fólk tilsamans av betala meir enn tey nakrantíð hava gjørt, skuldi Landsstýrið fingið sín vilja við tí, sum fólk spara við tað at inngjaldið til Als lækkar so at tað verður brúkt til Barnsburðargrunnin.

Hon sigur, at stýrið fyri ALS hevur samtykt, at lækka gjaldið til ALS, men tað var ongantíð talan um, at sparingin skuldi brúkast til Barnsburðargrunnin.

– Tað var alla tíðina ætlanin, at fólkið sjálvt skuldi fáa ágóðan, sigur hon.

Men skal barnsburðarfarloyvið so ikki longjast?

– Arbeiðsloysisskipanin og Barnsburðargrunnurin hava onki við hvørt annað at gera og skal farloyvið longjast, eiga politikararnir ikki at blanda ALS upp í tað. Fakfeløgini vóru ikki við, tá ið barsnburðargrunnurin var gjørdur og hann liggur á einum so høgum støði, at fólk kunnu fáa upp í 35.000 krónur um mánaðin úr honum. Skal tað bøtast um hann, mugu politikararnir fáa peningin aðrastaðni frá, enn frá ALS, tí fólkið betalir nóg mikið nú.

Skal barnsburðarfarloyvið longjast, kostar tað pening og tað er bara einastaðni at fara eftir pengunum, antin so ella so?

– Vit hava ikki havt nakra ávirkan á barnsburðargrunnin og tá poltikararnir gera eina skipan, sum er so rúmlig, at hon kann betala 35.000 krónur um mánaðin, mugu teir sjálvir finna fíggingina til tað, uttan at koma til løntakaran eftir meiri pengum, sigur Ingeborg Vinther.

# Talan er um at hækka skattin

**Ger Landsstýrið álvara av sínum ætlanum, er talan um eina skattahækking, hvussu tað so verður vent og snarað og tað er tað øvugta av tí, sum Landsstýrið hevur lovað, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag**

SKATTUR
*Áki Bertholdsen*


*– Tað, sum Landsstýrið nú er í ferð við, er at leggja eykaskatt á fólk og vinnulílv, hóast samgongan hevur lovað júst tað øvugta, sigur Jan Mortensen hjá Arbeiðsgevarafelagnum*

– Ger Landsstýrið álvara av hesum, er talan um eina skattahækking, hvussu tað so verður vent ella snarað.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er púra samt við fakfeløgunum í, at Landsstýrið skal skal halda seg frá pengunum, sum fólk spara, nú ætlanin er at lækka inngjaldið til ALS.

Nú ætlanin er at lækka inngjaldið til ALS, hevur Landsstýrið róð framundir at brúka tað, sum fólk spara til at fíggja eitt longri barnsburðarfarlovyi við.

Í greinini omanfyri mótmæla fakfeløgini at tað hendir og Arbeiðsgevararnir eru púra samdir.

– Vit halda ikki, at ALS og Barnsburðargrunnurin hava nakað sum helst við hvørt annað at gera, sigur Jan Mortensen á skrivstovuni hjá arbeiðsgevarunum í Vinnuhúsinum.

Hann sigur, at tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum hava ábyrgdina av Arbeiðsloysisskipanini og stýrið fyri ALS hevur hækkað og lækkað gjaldið, alt eftir, hvussu tíðirnar hava verið.

– Men tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum gjalda hækkingarnar og vit halda, at teir eisini eiga at fáa ágóðan av lækkingunum.

Hann sigur, at skal barnaburðarfarloyvið longjast, má Landsstýrið finna fíggingina aðrastaðni og at vita, hvar tað ber til at spara í almenna rakstrinum, tí fíggjarlógin er longu ríkiliga stór, sum hon er og nú er tíðin komin at vita, hvar tað ber til at spara í almenna rakstrinum.

Hann leggur dent á, at verða verri tíðir aftur, er onki at ivast í, at ALS gjaldið fer uppaftur, tí tað vil altíð hækka og lækka alt eftir, hvussu tíðirnar eru.

– Ger landsstýrið álvara av sínum ætlanum og tekur tað, sum fólk spara, nú ALS gjaldið lækkar, til barnsburðargrunnin, er tað onki uttan ein eykaskattur og tað er beint tað øvugta av tí, sum Landsstýrið hevur fráboðað, tí samgongan hevur lovað skattalætta, sigur Jan Mortensen.



# Almannastovan møguliga húsvill

**Leigusáttmálin millum Almannastovuna og P/F Dygd um leigu av bygninginum í Jónas Broncks Gøtu í Havn gongur út á nýggjárinum, og enn eru partarnir ikki samdir um at leingja leigumálið. Tískil kann Almannastovan gerast húsvill, fæst ikki ein loysn í næstum. Landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, hevur ongar viðmerkingar til málið.**

ALMANNASTOVAN
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Á nýggjárinum gongur sáttmálin millum P/F Dygd og Almannastovuna um leigu av bygninginum í Jónas Broncks Gøtu 27 út, og enn er nýggjur leigusáttmáli ikki fingin uppá pláss. Longu nú er tó greitt, at tað verður dýrari enn higartil, skal Almannastovan sleppa at halda fram at húsast í hesum bygninginum.*

Almannastovan hevur seinastu mongu árini leigað seg inn í stóra bygningin í Jónas Broncks Gøtu í Havn. Men á nýggjárinum gongur leigusáttmálin út millum Almannastovuna og P/F Dygd, sum eigur bygningin, og framvegis er óvist, hvørt Almannastovan sleppur at vera verandi í bygninginum, ella stovnurin noyðist at finna sær nýggj høli.

Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni, sigur, at sáttmálin upprunaliga gekk út í 2000, men er síðan longdur. Í summar fekk stjórin á Almannastovuni at vita, at tey fóru at vera uppsøgd úr bygninginum.

Partarnir hava síðan samráðst um nýggjan leigusáttmála, og fríggjadagin í síðstu viku var aftur fundur. Petra Joensen sigur, at eingin loysn varð funnin á tí fundinum, og partarnir hava avtalað nýggjan fund í november. Stjórin á Almannastovuni vónar, at ein loysn verður funnin á hølisviðurskiftunum hjá Almannastovuni sum skjótast. Hon leggur tó afturat, at skal Almannastovan framhaldandi leiga í bygninginum í Jónas Broncks Gøtu, so skulu ábøtur gerast.

– Vit hava sett okkum fyri at skapa eitt gott umhvørvi á Almannastovuni, bæði fyri viðskiftafólk og fyri starvsfólkini, og tí verður neyðugt at gera íløgur í bygningin. Til dømis ber ikki til hjá viðskiftafólki, sum sita í rullustóli, at sleppa upp á ovaru hæddirnar í bygninginum, tí lyftan er ov lítil. Og harumframt eru nógvar aðrar ábøtur, sum skulu gerast, sigur Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni.

Almannastovan leigar í dag í tveimum bygningum í Havn. Umframt bygningin í Jónas Broncks Gøtu leigar stovnurin seg eisini inn í bygningin hjá Føroya Sparikassa við Tinghúsvegin, har veitingardeildin hjá Almannastovuni heldur til.

Leigumálið við Tinghúsvegin byrjaði 1.februar í ár og er galdandi í hálvt triðja ár. Á fíggjarlógini fyri í ár eru settar av 2.661.000 krónur til leigu og viðlíkahald í samband við leigusáttamálarnar av hesum báðum bygningum. Sama upphædd er sett av í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár. Hølisútreiðslurnar av deildunum hjá Almannastovuni í Eysturoynni, í Klaksvík og Suðuroynni verða goldnar av kommununum á staðnum.

Sum nevnt er tað P/F Dygd, sum eigur bygningin í Jónas Broncks Gøtu, har Almannastovan heldur til. P/F Dygd er felag, hvørs einasta endamál er at eiga og útleiga bygningin í Jónas Broncks Gøtu, umframt ein bygning við Skálafjørðin. Nevndarformaðurin í P/F Dygd, Tummas Hanus Dam, hevur ikki stórvegis viðmerkingar til uppsøgnina.

– Leigumálið gongur út, og nú verður tingast um at endurnýggja leigumálið. Sjálvandi hava vit okkara krøv til eina møguliga endurnýggjan av sáttmálanum, eins og leigarin hevur síni krøv, sigur Tummas Hanus Dam. Hann váttar, at P/F Dygd vil hava leigukostnaðin broyttan, skal leigumálið halda fram. Nevndarformaðurin sigur, at fyrst og fremst verður samráðst við Almannastovuna um framhaldandi leigumál, áðrenn farið verður at samráðast við onnur um at leiga bygningin. Hann sigur seg vænta, at partarnir fara at fáa ein nýggjan leigusáttmála uppá pláss í næstum.

### Páll onga viðmerking

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, hevur onga viðmerking til støðuna hjá Almannastovuni. Hann vil ikki siga, um Almannamálaráðið hevur nakra alternativa loysn, skuldi tað ikki eydnast Almannastovuni at leingja leigumálið í Jónas Broncks Gøtu, ella um tað yvirhøvur verður arbeitt við at útvega stovninum onnur høli. Vit ætlaðu eisini at biðja landsstýrismannin um eina viðmerking til tað, sum var havt á lofti frá Løgtingsins røðarapalli í síðstu viku, um at Almannastovan kundi flutt í hølini hjá Postverkinum á Argjum. Men landsstýrismaðurin hevur stutt sagt onga viðmerking.

Staðfestast kann tó, at næsta ár er sama upphædd sett av í fíggjarlógaruppskotinum til leiguútreiðslur hjá Almannastovuni.

# Trý tilboð uppá asfalteringina av Vágatunnlinum

**Landsverkfrøðingurin fekk trý tilboð uppá at leggja slitlagið av asfalti í og við undirsjóvartunnlinum um Vestmannasund. 55.000 krónur eru á muni millum hægsta og lægsta tilboðið.**

LANDSVERKFRØÐINGURIN
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Tríggir bjóða sær til at asfaltera undirsjóvartunnilin um Vestmannasund. Landsverkfrøðingurin bjóðaði herfyri út arbeiðið at leggja slitlag av asfalti á koyribreytirnar í tunnlinum, umframt á økjunum við báðar tunnilsmunnarnar. Tilsamans er talan um 10.000 tons av asfalti, sum skulu leggjast á vegin.

Teir tríggir, sum bjóðaðu uppá asfalteringina vóru IR Lastvognar, Niels O. Joensen og Gestur Hansen. Teir báðir seinastu bjóðaðu uppá arbeiði saman við øðrum. Bíligasta tilboðið eigur Gestur Hansen, sum bjóðar sær til at gera arbeiðið fyri 15,50 krónur fyri tonsið av asfalti, ella fyri tilsamans 155.000 krónur. Næstlagsta tilboðið kom frá Niels O. Joensen, sum bjóðar sær til at gera arbeiðið fyri 18,90 krónur fyri tonsið, ella fyri tilsamans 189.000 krónur. Tilboðið frá IR Lastvognum ljóðaði uppá 21 krónur tonsið, ella tilsamans 210.000 krónur.

Sostætt lægsta tilboðið 55.000 krónur - tað er umleið ein fjórðapart, bíligari enn dýrasta tilboðið. Landsverkfrøðingurin fer nú at samráðast við tann, sum hevði bíligasta tilboðið, um at fáa arbeiðið gjørt.

Arbeiðið at leggja slitlagið av asfalti á koyribreytirnar í tunnlinum og á økini báðu megin tunnilin er mett at taka umleið tvær vikur at gera.


